gult cyan magenta svart



# IRIS er við fyri at royna seg

**– Vit stremba ikki eftir at koma víðari. Vit eru við fyri at spæla, sigur Oddur Olsen, ein av tónleikarunum í IRIS**



*Oddur Olsen er ein av limunum í bólkinum IRIS, sum verður við innleiðandi Prix-kappingini í Klaksvík.*
*Mynd: JáH*

Tónleikur

IRIS, sum fyrr kallaðist 69, spældi fyrstu ferð í Lognbrá.

Tá teir spældu í Lognbrá, høvdu teir ongan veruligan sangara, men tað gekk gott álíkavæl.

Í 1999 gjørdu teir av at fara til Prix Føroyar, og fingu ein nýggjan sangara til hesa kappingina. Tað var Tróndur Johannessen. Tróndur fekk ungdómin at kóka, tá teir spældu til síðsta Prixið í Klaksvík. Teir spældu rock og grunge, og tað gjørdi, at alt gólvið í KÍ høllini var fult av fólkið alla tíðina, meðan teir spældu.

Limirnir í IRIS eru teir somu, men hesaferð verður tað ikki Tróndur Johannessen, sum fer at undirhalda við sangum, men ein leirvíkingur, sum Oddur Olsen hevur fingið fatur í

– Hann syngur fantasktist og fer heilt sikkurt at fáa gólvið at rocka líkasum Tróndur fyri tveimun árum síðani, heldur Oddur.

Limirnir í IRIS eru annars Oddur Olsen, gittar, Óli Joensen, bass, Leif Egholm, gittar og Jens Pauli Joensen, trummur.

### Prát við Oddur

Fara tit at spæla Grunge líkasum tit gjørdu síðsta ár?

– Vit fara at spæla eitt sindur av hvørjum. Frá poppballadum til jazz og kanska rock av tí villasta villa.

### Eitt sindur til øll

Tit koma at hava 20 minutt-ir á palli. Hvussu nógvar sangir fara tit at spæla?

– Fimm

Navnið hjá orkestrinum var 69 fyrr, nú er tað broytt til IRIS. Hví?

– IRIS er ein Litgudur. 69 vuksu vit frá. Og kanska kemur navni IRIS mest frá navninum sum tann gamli hjá Harley var róptur Iris.

Ætla tit tykkum víðari?

– Vit stremba ikki eftir tí. Vit eru við fyri at spæla.

Hvør er málbólkurin hjá tykkum?

– Vit spæla okkurt til øll vanlig fólk, faktist øll fólk. Tungan jazz til tey eldru. Baby-rock til tey 15-17 ára gomlu.

Hvønn boðskap hava tit í ár?

– Lívsroyndir – hvussu ein upplivir gerandisdagin.

Programmið hjá tykkum?

– Vit hava eitt ógvuliga fast program. Vit leggja hart út og fara síðani at spæla okkurt stillari lag og enda við einum braki.

Hvaðani fáa tit tykkara inspiratión?

– Inspiratiónin kemur frá okkum øllum. Vit fáa hana frá hvørjum øðrum. Frá einari hægri eind, sum útgevur okkara egna útspæl.

Hvat við einari útgávu?

– Hevur hevur verið uppi og vent, men kanska mangla vit dirvi og ídni.

**JáH**

# Framsýning á Húsarhaldsskúlanum



**Handaliga arbeiðið hjá nemingunm á Húsarhaldsskúla Føroya í Klaksvík verður sýnt fram í dag**

Skeiðið á Húsarhaldsskúla Føroya er við at verða liðugt, og í tí sambandi skipa næmingarnir á skúlanum fyri stórari framsýning av tí handaliga arbeiðinum, sum teir hava gjørt.

Framsýningin í ár er størri og fjølbroyttari enn vanligt, og hetta kemst av, at skeiðið nú eru longt við 6 vikum.

Undirvíst hevur verið í hondarbeiðslærugreinunm, binding, tilskering, seyming, leður og skinn, patchwork, silkimáling, brodering, føroysk bond.

### Eisini café

Í samband við eina evnisviku, har evni var "Neytakonan ein horvin kvinnumynd", tilevnaðu næmingarnir klæði til eina neytadukku. Hesar vøkru dukkur verða eisini við á framsýningini.

Á framsýningini verður eisini høvi hjá teimum vitjandi at fara á cafe, fáa ein góðan køkubita, sum næmingarnir hava baka, afturvið einum góðum kaffimunni.

Sum nakað nýtt verður opið hús har vitjandi – kanska serliga komandi næmingar og foreldur teirra – kunnu fáa meira at vita um skúlan.

Framsýningin er opin týsdagin frá kl. 16:00 til 21:00, og Húsarhaldsskúli Føroya sigur, at øll eru hjartaliga vælkomin.

# Fyrstu finalistarnir funnir

Lognbrá í Klaksvík var seinasta leygarkvøldið karmur um tað fyrsta innleiðandi umfarið av ársins songrødd. Tiltakið var sera væl fyriskipað, og gjørdu fyriskiparnir av álvara sítt til at áhoyrarin var við í kappingini.

Við stórskíggja, ljós- og roykshowið og sápubløðrum varð bygt upp til eitt sera spennandi kvøld. Sjey luttakarar vóru tilmeldaðir – seks gentur og ein drongur.

Tann fyrsti luttakarin fór á pallin klokkan umleið 11.30, og longu tá var fult av fólki í hølinum. Sera skjótt gekk við at fáa luttakarnir á pallin, og tá tann seinasti var liðugur at frammføra sína egnu útseting av Lenny Kravitz sanginum »Føroyska Kvinna«, kom so tann løtan, ið øll spent bíðaðu eftir. Nú skuldi kunngerast, hvørjir tveir av teimum sjey songfuglunum skuldu sleppa víðari til finaluna og har fáa møguleikan at ogna sær høvuðsvinningin á 10.000 kr. Sera spennandi varð, tí allir luttakarnir høvdu gjørt sera nógv burturúr síni frammførslu.

Niðurstøðan bleiv so tann, at Randi Sivertsen og Nicolina Rubeksen komu víðari, ávíkavist sum nummar tvey og eitt.

Útfrá tiltakinum í Klaksvík leygarkvøldið at døma, hava vit nøkur sera spennandi innleiðandi umfør, og eina ikki minni spennandi finalu í væntu.

**tj**

# Bilur fór út av

**Fýra fólk vórðu flutt á skaða-stovuna, tá persónbilur fór út av vegnum við bergholið í Leynum**

ÓHAPP
*Eyðun Klakstein*

Leygardagin um 9-tíðina fekk løgreglan í Havn fráboðan um eitt ferðsluóhapp við Leynabergholið.

Ein persónbilur við fýra fólkum var farin út av, og tá boðini komu var illgruni um, at fólk sótu føst í bilinum.

So álvarsamt vísti tað seg tó ikki at vera, men øll fýra fólkini vórðu flutt á skaðastovuna. Tey høvdu fingið smærri snuddir av óhappinum.

Bilurin var á veg suðureftir, tá hann av eini ella aðrari orsøk fór út av vegnum. Løgreglan hevur bíðað við avhoyringunum av bilføraranum, tí hann var skelkaður av óhappinum.

Millum fólkini í bilinum var eitt smábarn.

### Vørubilur út av

Eitt annað ferðsluóhapp hendi leygardagin norðanfyri Kollafjørð. Ein vørubilur fór út av vegnum, og førarin av hesum bilinum verður skuldsettur fyri at hava koyrt við kenning.

Ein bilførari í høvuðsstaðnum varð um vikuskiftið tikin fyri at hava koyrt við kenning, men hesin var ikki úti fyri nøkrum óhappi.

Í farnu viku vóru tríggir bilførarar tiknir í Havn, tí illgruni var um, at teir koyrdu ávirkaðir av rúsdrekka.



gult cyan magenta svart

# ítróttur

Nr. 35 • týsdagur • 20. februar 2001 • 75. árgangur • www.sosialurin.fo

## Mjølnir vann eftir gysara

Lesið miðsíðurnar



# Gunnleyg er íslendskur steypavinnari

**Alt oyggjafólki var møtt upp á keiini at heiðra Gunnleyg og hinum gentunum úr ÍBV, eftir at tær í eini sera spennandi steypafinalu høvdu bast oddaliðnum, Haukar**

STEYPAFINALA
*Jákup Mørk*

Tað var ein stórhending fyri føroyskan hondbólt, sum fór fram, tá íslendska steypafinalan hjá kvinnum varð leikt leygardagin.

Annar parturin í finaludystinum vóru sonevndu eyjastúlkurnar, og millum leikararnar hjá hesum telist Gunnleyg Berg, sum hetta árið hevur roynt seg í bestu íslendsku deildini í liðnum hjá verandi meistarunum, ÍBV, úr Vestmannaeyjum. ÍBV vann finaludystin, og sostatt er Gunnleyg fyrsti føroyski hondbóltsleikarin, sum vinnur gull í eini steypafinalu uttan fyri landoddarnar.

Einasti føroyingur, sum okkum kunnugt hevur verið nær við, er Svanna Hanusardóttir, sum ta einu ferðina var við til at spæla finaludyst í Danmark. Ta ferðina taptu Svanna og tær tó við einum máli, og fram til leygardagin var hetta fremsta føroyska avriki í útlendskari steypakapping í hondbólti.

### Dysturin

Vit føroyingar hava bæði hetta og undanfarna vikuskiftið verið vitni til nakrar sera spennandi steypafinalur í bæði hond- og flogbólti, og sigast skal beinanvegin, at hvat spenningi viðvíkur, so stóð finaludysturin í Íslandi einki aftan hesar finaludystir.

Haukar eru í løtuni fremst í bestu íslendsku kvinnudeildini, og meginpartin av dystinum vóru tað eisini tær, sum høvdu steypið í eygsjón. Í hálvleikinum vóru tær á odda 8-6, og sambært íslendsku miðlunum, var tað einamest takk málverjanum, at ÍBV tá framhaldandi var inni í dystinum.

Tá bert fá sekund vóru eftir at spæla, brendi ÍBV tað, sum helst mundi vera teirra seinasti møguleiki, og Haukur hevði ivaleyst steypið í huganum, tá tær skuldu fara í seinasta álopið. Vit lata Gunnleyg greiða frá, hvat tað var, sum tá hendi við dystinum:

– Tað mundu vera eini 10-15 sekund eftir, tá Haukar kundi fara í álop. Venjarin hjá okkum hevði tá tikið Time-out, og hann bað okkum gera sum minst av mótstøðu hetta seinasta álopið. Ístaðin hildu vit tvær gentur frammi í álopinum, og so royndu vit bara at lokka tær til at avslutta álopið sum skjótast.

– Tær sluppu so at spæla seg púra leysar, men brendu møguleikan, og so fóru vit í mótálop. Hetta endaði við, at jugoslaviska Tamara Mandzic hjá okkum fekk brotskast, og hetta sendi hon í netið, soleiðis at vit vunnu rættin til longda leiktíð, sigur Gunnleyg um sera dramatiska dystin, sum varð spældur í Laugardalshøllini fyri gott 1.000 áskoðarunum.

Í longdu leiktíðini vóru tær hjá ÍBV omaná, og endaliga úrslitið gjørdist, at ÍBV vann dystin 21-19. Úrslitið eftir vanligu leiktíðina var 17-17.

### Stórfingin móttøka

Tá vit sunnukvøldið fingu orðið á Gunnleyg, var tað ein heldur moyr hondbóltsgenta, sum kundi greiða frá, hvussu leygarkvøldið annars hevði verið hjá teimum.

– Tað varð sjálvandi alt fyri eitt lagt upp til tað heilt stóru veitsluna, tá tað varð greitt, at vit høvdu vunnið finaludystin, sigur hon.

– Fyrst ráddi tó um at koma aftur til Vestmannaoyggjarnar, og tað var ein ótrúlig sjón, sum møtti okkum, tá ferjan kom inn móti landi.

– Eg haldi, at alt, sum kundi grulva, var komið á keiina at taka ímóti okkum, umframt tey mongu viðhaldsfólkini, sum høvdu verið í Reykjavík at stuðlað okkum í finaludystinum.

– Síðani vórðu vit riknar niðan á ein pall, so øll kundu síggja okkum, og fyri at gera alt upp aftur betri, varð eisini skotið við fýrverki, og eg kann gott siga, at tað var nakað væl flottari enn tað, sum Býráðið í Havn skeyt, tá vit komu inn í 2000.

– Síðani fóru vit allar á Pizzaria at eta, áðrenn vit fóru heim til formannin í hondbóltsfelagnum, og var so eisini meira fýrverkarí á skránni, greiður ein týðiligar rørd Gunnleyg frá.

### Stór uppliving

Meðan hon hevur leikt við Neistanum, hevur tað ongantíð eydnast henni at vinna hvørki lands- ella steypakapping, og sunnukvøldið royndi hon heldur ikki at krógva, at hetta so avgjørt var tað størsta, sum hon hevði roynt higartil.

– Hetta hevur bara verið heilt fantastiskt, men eg má viðganga, at eg eri fullkomuliga útkoyrd í dag. Vit góvu alt tað, sum vit áttu í okkum í finaluni, og kroppurin er at kalla deyður í dag, so nú er bara hvíld á skránni fyri mítt viðkomandi. Venjingin byrjar eisini longu mánadagin, so tað ræður um at verða klár til ta tíð.

### Fara eftir gullinum

Enn er landskappingin so langt ífra liðug, og eisini her hevur ÍBV møguleika at gera seg galdandi. ÍBV er í løtuni á øðrum plássi, seks stig aftan fyri Haukar, men hóast mótstøðuliðið í finaluni vinnur deildina, so er ikki víst, at tær eru meistarar, tá avtornar.

Í Íslandi er skipanin soleiðis, at átta tey bestu liðini koma víðari í eitt endaspæl, sum verður leikt eftir cup-skipanini. Har spælir nr. eitt so móti nr. átta, og so verður funnið fram til finaluluttakararnar eftir ávíkavist fjórðings- og hálvfinalur.

Spurd, um hetta eisini er nakað, sum tær hugsa um, nú gullið er komið til høldar í steypakappingini, sigur Gunnleyg, at tað er tað so avgjørt.

Hvør veit, kanska er søguskrivingin hjá Gunnleyg ikki liðug enn á hesum sinni. Møguleikin fyri greipuni er enn til staðar, og Gunnleyg og tær ætla sær so avgjørt at verja heitið, sum eyjastúlkurnar vunnu fyri knøppum ári síðani.



*Havnargentan, Gunnleyg Berg, er fyrsti føroyski hondbóltsleikarin, sum hevur vunnið eina steypafinalu uttan fyri føroysku landoddarnar*
*Mynd: Morgunblaðið*